## DAGSINS MEINING

# Ein grundlóg og onnur

Tað eru nú eygleiðarar, sum hada, at ES grundlógin, sum er á veg, nemur við føroysk viðurskifti. Hetta er at skilja soleiðis, at Danmark eins og onnur limalond noyðist at lata frá sær myndugleikaøki til ES myndugleikar. Her er helst fyrst og fremst talan um uttanríkispolitikkin, verjupolitikkin og mangt annað.

Tað eigur alt fyri eitt at verða farið undir at kanna hesi viðurskifti. Nú alt bendir á, at fullveldiskósin er broytt grundleggjandi, er hetta sera umráðandi. Ein orsøkin til, at undanfarna samgonga einki hevur gjørt við ES grundlógarmálið er ivaleyst, at tann samgongan hevði roknað við, at ES málið fór at loysa seg sjálvt av fullveldistilgongdini. Hetta er heldur ikki óhugsandi. Men nú talar eingin um fullveldi, og tí er tað í evstu løtu, at farið verður undir at greiða spurningin um støðu Føroya við atliti at ES grundlógini.

Hetta at fáa eina avklári ng av støðu Føroya eftir, at ES grundlógin er komin í gildi, er ein uppgáva hjá landsstýri og løgtingi. Her krevst nógv serfrøði og her krevst gott politikst tev. Allir hugsandi myndugleikar og serfrøðingar eiga at verða tiknir uppá ráð — ikki bert nakrir embætismenn i Tinganesi. Ein møguleiki hevði verið at latið grundlógarnevndina verið við í hesum arbeiði. Henda nevnd kundi við sínum drúgvu royndum ivaleyst gjørt sítt til at varpa ljós á allar teir mongu ivaspurningar í hesum máli. Tað er eisini neyðgut at fáa eitt alment orðaskifti um spurningin. Í hesum høpi trýtur kunning til almenningin. Eingin tykist í roynd og veru at vita, hvat ES grundlógin merkir fyri Føroyar. Her kundi landsstýrið byrjað við einum dyggum kunningartiltaki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking

**Kári P. Højgaard**
*Løgtingsmaður*



Afturkomin til húsa í kvøld hugdi eg í bløðini.

Í heilsíðufrásøgn á síðu 5 í Sosialinum, verður greitt frá, hvussu vánalig uppmøtingin er í tinginum. Ovast er mynd av fýra dámligum tinglimum, sum allir hava ein farra av smíli á varrunum. Tað er góð grund til tess, tí teir hava ongan tingfund mist í hesari setuni.

Tvær yvirskriftir eru við Jóhan Dahl, og tvær við Jógvan/Jógvan.

Undir yvirskriftini Jóhan Dahl skulkaði mest, stendur fráveran hjá øllum løgtingslimunum til teir 39 tingfundirnar í hesari setuni.

Síðan eg kom á ting í 2001, havi eg roynt at møtt hvørja ferð tingfundur er, og er tað bert onkur hendinga fundur, sum eg ikki havi verið á. Onkuntíð havi eg verið uttanlands í kommunalum ella privatum ørindum. Tá tinglimur er uttanlands í tingørindum, er hetta ein uppgáva, sum vit skulu røkja og eru vit tá til arbeiðis. Tí harmar tað meg almikið, at eg standi til at møta illa upp, við 5 fráverum hesa setuna.

Eg havi mist ein tingfund í hesari setuni, tí eg umboðaði Runavíkar Kommunu í Hetlandi eitt vikuskifti.

Eg luttók ikki á fýra tingfundum, tí eg sum valt umboð av Løgtinginum í Norðurlandaráðið, var á fundi í Helsinki. Hetta er ikki at skulka og eru tað tí ikki røtt tíðindi, ið her verða framborin.

Løgtingslimur Sjálvstýrisfloksins er eisini limur í Útnorðurráðnum.

Tað er gott at eitt vakið eyga fylgir við politisku skipanini og talar at, um okkurt átaluvert verður framt. Men tað kann ikki vera rætt, at løgtingsformaðurin verður skrásettur at skulka fýra dagar, tá hann var staddur í Keypmannahavn til brúdleypið hjá Fríðriki krónprinsi og Mary krúnprinsessu, umboðandi tingið

# Løgmaður má greiða frá, hví hann hevur sagt ósatt

### – opið bræv til Jóannes Eidesgaard, løgmann

*Tórshavn 26. mai 2004*

**Vegna Tjóðveldisflokkin**
**Høgni Hoydal**

**Vegna Miðflokkin**
**Jenis av Rana**





Løgmaður hevur alment borið fram tey tíðindi, at nýggja landsstýrið hevur spart 10% í miðfyrisitingini í mun til undanfarna landsstýrið.

Tað kann skjalprógvast, at hetta er ósatt. Í fyrsta lagi hevur landsstýrið bert útsett eina íløgu í telduskipan til heilsuverkið til næsta ár. Í øðrum lagi, hevur Løgtingið gjørt sparingar í fyrisitingini, sum landsstýrið ikki hevði skotið upp.

Allastaðni í heiminum er tað eitt álvarsmál um ein stjórnarleiðari sigur ósatt fyri almenninginum. Og tað er sera álvarsligt, at løgmaður ber fram hesi ósannindi til tess at lasta undanfarna landsstýri og at pynta seg við læntum fjaðrum.

Tað kann rætt og slætt ikki góðtakast, at løgmaður ber fram ósannar upplýsingar til almenningin.

Sum andstøðuflokkar er tað okkara uppgáva at fáa lýst hetta mál, og tí vilja vit hervið heita á løgmann um alment at greiða frá, hví hann hevur sagt ósatt í hesum máli.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# STJÓRNARSKIPAN v.m.

**Heri Mohr**



"Dimmalætting" nr. 97 (25.05.04) kunnger á síðuni Meiningar & Heilsanir eina grein um stjórnarskipan sum ta fyrstu í eini komandi røð skrivað av *formanninum, næstformanninum og skrivaranum í grundlógarnevndini.*

Flest allir føroyingar - eftir seinasta løgtingsvali at døma umleið 70% av veljarunum - høvdu vónað, at tann politiski ófriðurin og ótryggleikin, sum í 5 ár órógvaði og avskeplaði dagligu tilveruna her í Føroyum, skuldi fara í søguna, og ein nýggj tíð í harmoni við føroyska psyku fór sum ein annar Føniks at rísa uppaftur úr øskuni, nú ein breið og vónandi sterk samgonga mannar landsstýrið.

So bláoygd mugu vit tó ikki vera, tí har, sum ein skriða er lopin, er onnur væntandi, og um verandi løgtingssamgonga ikki rekur tann politik, sum ein stórur meiriluti av Føroya fólki hevur givið henni (samgonguni) mandat til, fáa vit eitt politiskt skriðulop um 4 ár, sum kann verða til óbótaligan skaða fyri tilveru føroyinga í Føroyum.

Syngið tá um lagnu og blóð og fjallafonn, tað gevur bingo í portrinum til tað nationalistiska Elysion.

Í nevndu grein verður fráboðað, at hon og komandi greinarøð eru meðvitað polemiskar, og skotið verður upp, at "vit samtykkja eina mannagongd", til tess at føroyingar kunnu "taka seg burtur úr samveldi sínum við Danmark".

Fyrsta greinin er sum sagt skrivað av trimum tittlum, og so hevur hon onga undirskrift. Hetta virkar ikki serliga professionelt, og óvist er, um seriøs fólk fara at luttaka í einum polemikki, sum valla kann brúkast til nakað skilagott, konstruktivt í okkara gerandisdegi, og í versta føri verður stóra trumma, sum skal hirða undir politisku øsingina í okkara lítla landi.

Í kvøld (25/5) hoyrdu vit í Ú/F, hvat ið tann dugnaligi bankastjórin J. Astrup Hansen hevur sagt í Keypmannahavn (í Fólkatinginum ?) um stuðulin, sum ríkiskassin letur til tað **føroyska** heilsuverkið (Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús, Suðuroyar sjúkrahús, Statshospitalið í Havn, Ríkishospitalið v.m.) og **almannaverkið** (pensiónir, heimarøkt, røktarheim, dagstovnar, sjúkrakassar v.m.). Óvæntað og hugstoytt at hoyra tað, sum hann skal hava sagt, tí hann veit kanska betur enn nakar, hvussu tað sveiggjandi økonomiska barometrið skikkar sær í Føroyum.

Tað kann vera óheppið og volda størri skaða enn gagn at lata seg (mis)brúka av politikarum.

Og í "Dimmalætting" - eisini í kvøld - lósu vit eina grein hjá Rolf Guttesen um tað, ið Hermann Oskarsson, formaður í búskaparráðnum (gestatalarin, sum í Hósvík greiddi frá, at síðani 1993 hevur landskassin bert brúkt 10% av blokkinum), skal hava sagt í Danmarks Radio P2.

Hetta fekk meg at minnast aftur á tað, sum ein kendur havnarmaður segði fyri nógvum árum síðan:

"Einki sjokerar meg meira", og so sló hann seg á pannuna.

Eg sigi og geri sum hann, og annars haldi eg meg til William Heinesen: "Vi må nu se, om vi så nogenlunde kan holde balance mellem det latterlige og det ophøjede".

# Mentanargrunnur Landsins latið starvslønir



*Nevndin í Mentanargrunni Landsins hevur gjørt av at lata Rannvá Kunoy, listakvinnu starvsløn í trý ár framyvir. Tilsamans komu 111 umsóknir inn, harav vórðu bert 23 játtaðar*

111 umsóknir um starvslønir komu inn til Mentanargrunn Landsins fyri 2004, men bert 23 vórðu játtaðar. Tilsamans verða 94 mánaðarlønir, fyri slakar 2 millónur krónur, latnar.

Listakvinnuni Rannvá Kunoy, ið arbeiðir í London, varð játtað løn í 3 ár.

Hanus Kamban, rithøvundur fær løn í 1 ár.

Marianne Clausen, tónlistagranskari fær løn í 6 mánaðir.

Jóanes Nielsen, rithøvundur, fær løn í 6 mánaðir.

Tóroddur Poulsen, rithøvundur, fær løn í 6 mánaðir.

Anker Mortensen, listamaður, fær løn í 6 mánaðir.

Vígdis Petersen, listakvinna, fær løn í 6 mánaðir.

Eisini hava 5 myndlistafólk fingið løn í tilsamans 16 mánaðir, 4 tónlistafók í tilsamans 8 mánaðair, 5 rithøvindar í 13 mánaðir tilsamans og sjónleikaravirksemið hevur fingið 3 mánaðanslønir.

**eys**

# Drúgt arbeiði at velja og vraka umsøkjarar

**Tað sigur Rói Paturson, ið er formaður í Mentanargrunni Føroya. Fyrsta árið starvslønir vórðu latnar, vóru nakrir og trýssj umsøkjarar, í ár vóru tað 111. So tað verður verri og verri at velja burturúr. Men vit hava eina lóg at ganga eftir, sigur hann**

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Rói Paturson er formaður í Mentanargrunni Landsins. –Øll, sum fáast við eitthvørt skapandi kunnu søkja um starvsløn. Umsóknirnar verða eisini fleiri fyri hvørt ár sum fer, og tað er gott, sigur hann*

Í november mánaði varð lýst við, at tað stóð øllum í boði at søkja um starvslønir frá mentanargrunninum. Freistin var úti í februar, og síðani tað, hevur nevndin nýtt nógvar tímar, bæði á fundi og hvør sær heima við hús, at lesa og granska hvørja einstøku umsókn væl og virðiliga.

– Vit hava bara 2 milliónir kr. at lata, so tað er greitt, at øll ikki kunnu fáa tað, tey ynskja. Nógvar umsóknir eru, har fólk ynskja løn ímillum 1-3 ár til at arbeiða við eini størri verkætlan, men tað kunnu vit ikki geva. Bert eitt listafólk fær løn í trý ár og eitt fær í eitt ár. Hini kunnu so kanska fáa 6 ella 3 mánaðir við løn, sigur Rói Paturson.

Hann sigur, at tað er ógvuliga ymsikt, hvat fólk ætla at nýta peningin til. Onkur er, sum bert ynskir at fáa tíð at mennast innan t.d. málningalistina, meðan onnur hava eina heilt ítøkiliga ætlan, t.d. at umseta eina ávísa bók ella seta ein ávísan leik upp.

– Tað eru ofta tey somu, sum søkja, men tað er tí, at tey eru so fá, ið veruliga arbeiða seriøst við listini. Tey skulu eisini søkja hvørt ár, tí tað er tað, sum ætlanin við grunninum er, greiðir Rói frá.

Eftir at tíðin við starvslønini er farin, skulu øll listafólkini geva eina frágreiðing av arbeiðnum, og so skal nevndin eftirmeta arbeiðið.

5 fólk sita í nevndini, Rói Pa turson, formaður, Hanus undir Leitinum, næstformaður, Urd Johannsen, Kirsten Brix og Laura Joensen. Nevndin hevur ikki loyvi at sita meiri enn tvey skeið í senn, so skal hon skiftast.

# Odd fellow Ordanin í Tórshavn letur hurðarnar upp

**LOSJA**
*Tíðindaskriv*

Í samband við Mentanarnáttina 2004 bjóðar losja nr. 1 Ambolturin IOOF øllum áhugaðum at vitja losjuna á Grønlandsvegi nr. 45 millum 19.00 og 22.00.

Nógv halda, at tað hendir nakað løgið og óhugnaligt í eini Odd Fellow losju, men tað heldur m. a Edward Ingebrigtsen úr Vestmanna ikki. Sjálvur hevur hann verið limur síðan stovnanina í 1986. Føroyska losjan byrjaði í leigaðum hølum í Vestmanna, men tá hølini gjørdust ótíðarhóskandi, var støða tikin til at flyta til Havnar og ognin á Grønlandsvehi nr. 56 bleiv keypt til endamálið.

Odd Fellow Ordanin er ein altjóða felagsskapur, sum byggir á tey menniskjaligu virðini. Fyri at gerast limur í felagsskapinum krevst einki serstakt, figgjarligt, politisk ella átrúnaligt støði, ella annað sum skilir fólkið. Tær einastu treytirnar eru, at ein skal vera rættarliga myndugur, og at man trýr á eina hægri makt.

Liminir verða kunnaðir við eina rúgvu av »etiskum« livireglum ið fremja sátt og semju millum menniskju i gerandisdegnum, og at »ein tænir sær sjálvum best, summ hann fænir øðrum«.

Odd Fellow Ordanin ber orð fýri at vera sera duldarfullur, men soleiðis er veruleikan als ikki, tað er einki ið ikki tolir dagins ljós.

Odd Fellow Ordanin er meira enn bert losjuarbeiði, tað røkkur eisini frá samkomun fyri eldri og sjúkum, til tað árliga gávuhandanina frá Stórlosjuni uppá 250.00 kr. til læknavísund.

Úr teimum ymisku grunnunum ið ODD Fellow felagsskapurin ræðir yvir og innsavnaðum peningi millum brøður og systurlosjunar, verða eisini lætnar milliónir av krónum til vælgerandi endamál.

Á mentanarnáttini 2004 verður opið hus á Grønlandsvegur nr. 56 millum 19.00 og 22.00 har øll eru hjartaliga vælkomin, at seta spurningar losjuni viðvíkjandi og eftir førimuni fáa hesar svaraðar.

# Rætting

Í greinini "Ongar tænastuvinnur verða skrásettar í Føroyum", sum stóð í hósdagsblaðnum, varð skrivað, at KT-vinnan fær síni hagtøl um ársskiftið, og at einki er at frætta um hinar tænastuvinnurnar.

Hetta er skeivt. Tað skuldi sjálvandi staðið, at ein lóg ætlandi kemur í gildi um ársskiftið, sum fer at tryggja skráseting av øllum útflutningi, ikki bara av KT-vinnuni. Vinarliga haldið mær tilgóðar.

**eys**